Yvirtøkan av kirkjuni:

# Bispur onki at stúra fyri

**– Tað er ógvuliga umráðandi fyri meg at vit fáa eitt gott samstarv við tey, sum arbeiða í Fólkakirkjuni, nú hon skal yvirtakast og lagast til føroysk viðurskifti og tey skulu ikki stúra fyri, at nakað verður kroyst niðuryvir høvdið á teimum, sigur Annlis Bjarkhamar, Landsstýriskvinna í kirkjumálum**

YVIRTØKAN AV FÓLKAKIRKJUNI
*Áki Bertholdsen*



*Annlis Bjarkhamar og bispur eru ósamd um yvirtøkuna av kirkjuni, men nú skulu fundir vera, sum kanska fara at rudda ymisk ivamál av vegnum. Eg havi als ongan áhuga í at broyta grundleggjandi viðurskifti í kirkjuni, vil kirkjan tað ikki sjálv, sigur landsstýriskvinnan í kirkjumálum*

–Eg skilji væl biskupin, at hann fegin vil vera ein partur av hesum arbeiðnum. Men hann skal ikki stúra fyri, at vit fara at kroysta nakað niðuryvir høvdið á kirkjuni, sum hon ikki kann góðtaka.

Annlis Bjarkhamar, landsstýriskvinna í kirkjumálum, sigur, at hvørki biskupur, ella nakar annar, sum arbeiðir í fólkakirkjuni, eigur at stúra fyri at verða skúgvaður til viks, nú kirkjan skal yvirtakast og lagast til føroysk viðurskifti.

## Ongin átala

Tað stendur í samgonguskjalinum, at tað skal vera í neyvum samstarvi við allar partar í kirkjuni, at hon verður yvirtikin.

Men kortini hevur fundur verið við danskar myndugleikar fyri tveimum vikum síðani, uttan at hægsti embætismaður í kirkjuni, biskupur, hevur hoyrt orð ella eið og ti ber hann ótta fyri, at kirkjan framvegis fer at verða skúgvað til viks í sambandi við yvirtøkuna, eins og hann sigur at hon var tað undir seinasta landsstýrið.

Og hann heldur ikki, at Mentamálaráðið hevur tikið orðini í samgonguskjalinum eru tikin fyri fult.

Tað heldur Løgmaður kanska heldur ikki, tí eftir fundin, sum nú hevur verið ímillum føroysk og donsk embætisfólk um yvirtøkuna av fólkirkjuni, hevur hann givið aðalstjóranum í Mentamálaráðnum greið boð um, at orðini í samgonguskjalinum skulu aktast.

Á forsíðuni á Sosialinum hósdagin, varð hetta gjørt til, at hann hevði fingið eina nøs frá Løgmanni. Tað er ein miskiljing, tí ein nøs er ein átala og er eitt álvarsmál.

Tað var tað ikki talan um í hesum føri.

## Fund við kirkjufólk

Og Annlis Bjarkhamar vissar eisini um, at samgonguskjalið skal haldast, tí tað er sjálvsagt.

Hon sigur, at fyri sær er tað sjálvsagt, at yvirtøkan verður framd í neyvum samstarvi við allar partar í kirkjuni, tí tað vildi verið burturvið at kroyst eina skipan niðuryvir kirkjuna, sum tey, ið varða av henni, ikki vilja vita av ella góðtaka.

Hon sigur, fundurin, sum nú var við donsk embætisfólk var mest fyri at gera støðuna upp at vita, hvussu langt samráðingar eru komnar og fyri at leggja nýggjan fund til rættis.

– Næsti fundur er avtalaður at vera í september. Og eg haldi, at tað er umráðandi at vit brúka tíðina til tá at viðgera støðuna her heima í Føroyum.

– Eg haldi, at tað er ógvuliga umráðandi, at vit brúka tíðina ímillum samráðingarfundirnar til at arbeiða við málinum her heima í Føroyum.

Annlis Bjarkhamar sigur, at tað hevur alla tíðina verið ætlanin og longu í hesi vikuni fer samráðingarnevndin sostatt at hava fund um ætlaðu yvirtøkuna við ymsar partar, sum vara av kirkjuni, eitt nú biskupin, prestafelagið, dómpróstin og kanska onnur við.

Hesa vikuna verður fundur við dómpróvstin og felagið fyri kirkjuráðslimir.

Á teimum fundunum fara vit í fyrsta umfari at tosa um samráðingarnar higartil og, hvussu vit best fyrireika okkum til næsta samráðingarumfar í september. Harumframt fara vit at tryggja, at alt, sum er viðkomandi verður tikið við í sjálvum samráðingunum.

Hevði tað ikki verið rættari at vent sær til biskupin og onnur kirkjufólk undan samráðingunum, tá ið yvirtøkan nú skuldi vera í neyvum samstarvi við allar partar?

– Tað gjørdu vit eisini. Vit høvdu fund við bisp í sambandi við ein samráðingarfund, sum varð avtalaður í mars mánað. Men tann fundurin varð avlýstur og síðani er onki nýtt hent sum gjørdi, at vit hildu, at tað var neyðugt at hava ein fund afturat við bisp undan fundinum nú seinast í juni.

## Tveir spurningar

Annlis Bjarkhamar sigur, at í sambandi við yvirtøkurnar, eru tað tveir spurningar, sum eru ógvuliga nær samantengdir.

– Í fyrra lagi er tað spurningurin um sjálva yvirtøkuna og í øðrum lagi er tað spurningurin um, hvussu vit skipa eina føroyska kirkju, eftir yvirtøkuna.

Hon heldur, at tað er lítið endamál ið at yvirtaka eina danska kirkju uttan samstundis at laga hana til føroysk viðurskifti, so at tað verður okkara egna kirkja.

Júst hetta er ein av spurningurin, sum biskupur er serliga ivasamur um. Hann heldur, at tað er óðamannaverk at yvirtaka kirkjuna, uttan at vit frammanundan hava gjørt okkum fullkomiliga greitt, hvussu hon skal verða skipað, tá ið hon er blivin føroysk? Gera vit ikki tað er vandi fyri, at arbeiðið fer at vera merkt av handahógvi í vónini um at ongin klagar, heldur hann?

Hesum er Annlis Bjarkhamar ikki samd í.

– Enn vita vit ikki, hvussu treytirnar fyri yvirtøkuna vera. Og fyrrenn vit vita, undir hvørjum treytum, vit yvirtaka kirkjuna, er heilt einfalt ómøguligt nágreinliga at gera greitt, hvussu kirkjan skal skipast í framtíðini.

Eitt nú vísir biskupur á, at føroyska kirkjan er undir donsku grundlógini.

Samstundis er tað drotningin, sum formliga góðkennir ritual, sálmabøkur o.a. so at tær vera lóg í kirkjuni.

– Hvussu verður við hesum, og nógv ørðum spurningum, hava vit ongan møguleika at vita nakað um, fyrrenn treytirnar fyri sjálvari yvirtøkuni er greið.

Hetta eru tveir av spurningunum, sum skulu avgerast í samráðingunum.

– Tí ber heilt einfalt heldur ikki til at skipa eina føroyska kirkju, fyrrenn yvirtøkan er framd, tí enn vita vit als onki um, hvat úrslitið verður, sigur kirkjumálaráðharrin.

– Men fyri tað er tað avgjørt rætt at hava kjak í Føroyum um hesi viðurskftini longu nú. Og samstundis er tað eisini avgerandi neyðugt, at vit loyva samráðingunum at ganga sína gongd, uttan at grugga málið óneyðuga illa.

– Og eru ivamál, er tað sjálvsagt, at tey verða tikin upp í samstarvi við kirkjuna.

Annlis Bjarkhamar sigur, at kreftirnar í føroysku kirkjuni eiga tí heldur at vera brúktar upp á at viðgera, hvussu kirkjan skal skipast, tá ið hon er komin á føroyskar hendur, tí sjálv yvirtøkan er bara at flyta myndugleikan yvir kirkjuni úr Kirkjumálaráðnum í Danmark, yvir í Mentamálaráðið í Føroyum.

– Innihaldið í kirkjuni verður fullkomiliga óbroytt. Tað er ikki fyrrenn at kirkjan er yvirtikin, at tað ber til at taka viðgerðina upp um, hvussu tann føroyska kirkjan skal skipast.

– Vit skulu sjálvandi viðgeraða hetta allatíðini, men avgerðin kann ikki takast, fyrrenn Kirkjan er yvirtikin.

## Ongin endalig avgerð

Men Annlis Bjarkhamar tískil, at tað hevur týdning, at vit longu nú fara undir at viðgerða spurningin um, hvussu Kirkjan skal skipast, eftir at hon er yvirtikin.

– Tað tykist sum um onkur hevur fingið tað fatan, at uppskotið, sum ein nevnd gjørdi um yvirtøkuna, er grundarlagið undir samráðingunum við donsku myndugleikarnar og at kirkjan skal skipast eftir uppskotinum, tá ið hon er yvirtikin.

– Hetta er ein misskiling, sigur Annlis Bjarkhamar.

– Hetta uppskotið er ikki annað enn eitt útgangsstøðið sum lýsir støðuna og skuldi skapa eitt grundarlag fyri samráðingunum.

– Men tað er ongin sum sigur yvirhøvur, at hetta verður tað endaliga úrslitið og er tað onkur, sum hevur hug at hongja seg ov fast í orðingarnar í sjálvum uppskotinum, er skjótt at kjakið fer inn á skeivt spor og tað vildi verið óheppið.

– Kjakið skal líta frameftir og ikki aftureftir til eitt uppskot, sum ikki er annað, enn júst eitt uppskot og ikki ein endalig avgerð av nøkrum sum helst slagi.

– Men uppskotið gevur okkum nakað at arbeiða út frá. Uppskotið hevur verið til hoyringar ymsastaðni og nakrar afturmeldingar eru komnar. Útfrá uppskotinum og teimum afturmeldingum, sum eru komnar, eiga vit at finna eina gongda leið.

– Men tað skal vera í neyvum samstarvi við kirkjuna.

## Onki kroyst niðuryvir høvdið

Eitt, sum Biskupur stúrir fyri, er, at eftir uppskotinum fer bispaembætið at verða munandi skert og endaligi myndugleikin verður ístaðin lagdur til eina kirkjustjórn, har meirilutin eru leikfólk. Samstundis skal kirkjan fíggjast við kirkjuskatti. Tí heldur hann, at fólkakirkjan í veruleikanum verður avtikin soleiðis sum vit kenna hana í dag og at hon í roynd og veru verður til eina fríkirkju?

– Tað kann ikki sigast nóg ofta, at kirkjan verður yvirtikin óbroytt og tí eigur ongin at stúra fyri sjálvari yvirtøkuni. Og tað er ikki fyrrenn aftaná, at vit skulu viðgerða, hvussu kirkjan skal skipast og sum sagt er uppskotið ikki ein endalig avgerð og tí skal ongin heldur hongja seg ov nógv í smálutir í tí.

– Tað, sum telur fyri meg, er, at øll tey, sum eru partur í fólkakirkjuni, skulu vera við til at forma tað føroysku kirkjuna. Tað er tað endaliga úrslitið sum telur og eg fari at leggja sera stóran dent á, at allir partar í kirkjuni eru við í tí tilgongdini, sum tað verður at skipa eina føroyska kirkju.

– Ongin eigur at vera bangin fyri, at fáa nakað sum helst kroystan niður yvir høvdið. Eg havi als ongan áhuga í at broyta grundleggjandi viðurskifti í kirkjuni, vil kirkjan tað ikki sjálv. Kirkjan skal hava loyvi at liva sítt egna lív og í sínum egna mátti, har vit ikki leggja bindingar á hana, ella stýra henni. Tað er av størsta týdningi.

– Men samstundis mugu vit heldur ikki gloyma, at talan um eina fólksins kirkju, tað er líka týdningarmikið.

– Latum okkum minnast til at lata hugsjónina um eina føroyska fólkakirkuni verða okkara stavnhald í øllum arbeiðinum í sambandi við yvirtøkuni, og í kjakinum um, hvussu vit best skipa eina føroyska fólkakirkju.

– Bara soleiðis fáa vit ein veruligan møguleika at skapa nakað sum er gott og sum vit kennast við, sigur Annlis Bjarkhamar, Landsstýriskvinna í kirkjumálum.



# Kvinnuligur virkisleiðari

**26 ára gamla Malena Poulsen úr Klaksvík er virkisleiðari á Pure Water í Klaksvík. Tað, sum fyrr var kent sum Roykivirkið. Malena heldur starvið vera sera spennandi og læruríkt.**
**- Mær hevur altíð dámt fiskaarbeiði væl, sigur Malena**

SAMRØÐA
*Solby A. Eliasen*



*26 ára gamla Malena Poulsen úr Klaksvík er virkisleiðari á Pure Water í Klaksvík*

Klaksvík:
Malena stendur og baksast við eina etikett maskinu, tá Sosialurin kemur á gátt. Hon hyggur upp og sigur:

" Eg komi beinanvegin, má líka gera hetta fyrst. Tú hevur ikki ringa tíð, ha?

Eg risti við høvdinum og standi bert og eygleiði hana, meðan hon ger seg lidna.

Vit fara inn á skrivstovuna og sessast við eitt borð.

- Hetta er fyrstu ferð, eg seti meg niður í dag, sigur Malena og suffar gleðiliga.

- Hetta starvið er sera ábyrgdarfult og krevjandi. Stutt sagt, so havi eg ábyrgdina av øllum, sum hevur við framleiðsluna at gera. Eg skal syrgja fyri, at framleiðslan gongur so væl sum yvirhøvur gjørligt allatíðina. Harumframt havi eg eisini ábyrgdina av at úrtøkan er góð.

Ein annar partur av starvinum hjá Malenu umfatar setan av størvum. Tað vil siga, at hon avger hvør fær starv ella ikki. Tað heldur hon vera eina sera stóra, og til tíðir ikki serliga stuttliga, ábyrgd.

- Tí tá ein hevur ábyrgd av at seta fólk í starv, so er ábyrgdina eisini tín, tá tað kemur til tað mótsatta.

Malena hevur útbúgving frá fiskivinnuskúlanum í Vestmanna. Hon var liðug í fjør. Og arbeiddi fyrst á Sammut, sum fyri tað mesta fæst við saltfisk. Síðani fór hon til Northern Fish Cold Storage, har hon arbeiddi, inntil hon søkti starvið sum virkisleiðari á Pure Water.

Hon hevur eisini starvast á Pure Water í stytri tíðarskeið, í eitt nú summarfrítíðum.

Tað eru ikki nógvar kvinnur, sum eru virkisleiðarar í landinum. Og Malena sigur, at hon veit ikki um nakra aðra. Hon sigur eisini, at øll, sum hon gekk í flokki saman við á fiskivinnuskúlanum, sum ikki eru farin í víðari lesnað, hava fingið góð størv.

- Eg rokni við, at stjórin tók ein tjans, tá hann valdi at seta meg í starvið, tí eg eri so ung og eg ikki havi nakrar royndir frammanundan. Men tað var kanska eisini júst tí, hann valdi at seta meg, sigur Malena og leggur skemtandi aftur at, at vanliga hugsar ein um menn í aldrinum 50 ár og upp eftir, tá tað kemur til virkisleiðarar.

## Kvinna – ikki ein trupulleiki

Sum virkisleiðari er Malena so at siga næst eftir stjóran, Eyðbjørn Poulsen. Eftir Malenu koma so arbeiðsformenninir, sum á Pure Water eru fýra í tali. Tríggir menn og ein kvinna.

Malena heldur ikki, at tað tykist at vera ein trupulleiki, at hon er ein kvinna, sum hevur mannfólk arbeiðandi undir sær.

- Tá eg byrjaði fyrst í apríl, so presenteraði stjórin meg fyri øllum starvsfólkunum her. Og øll hava tikið so væl í móti mær. Eisini havi eg fingið nógva hjálp frá arbeiðsformonnunum, sum hava sett meg inn í, hvussu tingini virka her á virkinum. Eisini var hin virkisleiðarin her saman við mær tann fyrsta mánaðin. Og hóast tað var deiligt, so var tað enn meiri deiligt, tá hann var farin, tí so longi hann var her, so gekk eg so at siga bara aftan á honum. Tí starvsfólkið, sum kendu hann og vóru von við hann, spurdu sjálvsagt bara hann, tá okkurt var at spyrjað um.

Tá hann so var farin, so kendi eg tað fyri fyrstu ferð, at tað var eg, sum var virkisleiðari og tá stóð við allari ábyrgdini. Tað kendist eitt sindur ræðandi, men avbera gott og spennandi samstundis.

- Men eg veit sjálvandi ikki, hvat starvsfólkið tosar um, men eg kenni meg væl her, so eg dugi ikki at ímynda mær, at nakar nevniverdur trupulleiki er.

Hvønn dag eftir loknan framleiðsludag, skal Malena føra dagroknskap og úrtøku inn á telduna.

Malena hevur ikki nakað fast stað at standa á niðri á virkinum, tað letur seg ikki gera hjá henni at vera bundin til eitt stað, tí tað er so nógv ymiskt, sum hon skal taka sær av. Men hon er ikki bangin fyri at taka eina hond í, um hon sær, at tað leikar hart á onkunstaðni eina løtu.

- Tað haldi eg er avgerandi fyri sambandi millum starvsfólkini og virkisleiðaran. At ein tekur eina hond við, tá tað treingir til.

Arbeiðsdagurin hjá Malenu er langur. Hon byrjar um hálvgum átta tíðina á morgni, og um tað verður arbeitt til klokkan fýra seinnapartin á virkinum, so er hon sum oftast ikki liðug fyrr enn klokkan líður væl í móti hálvgum seks.

- Mær nýtist ikki at koyra alt inn á telduna á kvøldi, áðrenn eg fari til hús. Eg kann eisini gera tað um morgunin, men eg vil verða komin inn í øll tingini, áðrenn eg fari at loyva mær at slakka av upp á dagføringina, um ein kann siga tað so. Eg haldi, tað er gott at vera ajour allatíðina, so tað er eitt av teimum tingunum, sum eg raðfesti høgt.

Malena sigur, at starvið er sera krevjandi, og til tíðir eisini eitt sindur stressandi.

- Serliga kann eg verða móð í høvdinum onkran dag, tí tað er so nógv at hugsa um allatíðina. Tað er ikki bara stuttligt, kann eg siga tær. Avgerðir skulu takast hvønn dag, og tað skal helst vera tær røttu avgerðinar. Eisini ringir telefonin allatíðina, greiðir Malena frá.

Hon hevur ikki meiri enn sagt tað, so ringir telefonin fyri fyrstu ferð, síðani vit settust at práta.

Malena tekur hana, og beinanvegin skilst á lagnum, at tað er fiskur til komandi viku, tað snýr seg um. Eftir eini lítlari løtu er tað avgreitt, og vit byrja aftur at práta. Men vit verða avbrotnar tríggjar ferðir aftur at av telefonini. Malena orsakar, men tekur telefonina, tí arbeiðið má koma í fremstu røð.

## Laksamarknaðurin mettaður

Á Pure Water arbeiða tey fyri tað mesta laks, upsa, hýsu og tosk. Malena hevur eisini ein part av ábyrgdini fyri at keypa rávøruna inn. Beint nú arbeiða tey við upsa.

- Tað er ongin laksur fyri tíðina. Heldur ikki nakar prísur á liðugtvøruni, sigur Malena. Spurd um, hvør orsøkin man vera til tað, sigur hon, at hon heldur, at tað helst er tí at laksamarknaðurin er mettaður, heldur enn ILA sjúkan, sum ger tað.

Pure Water keypir ofta fisk inn saman við P/F Kósin Seafood. Og tá tey keypa laks, keypa tey frá Faroe Salmon. Tað er stjórin, sum tekur sær av innkeypinum.

Nú eru vit lidnar at práta, og Malena má skunda sær aftur til arbeiðis. Steðgurin, sum hon hevur havt, meðan vit hava prátað, er helst tann einasti, hon fær henda fríggjadagin, tí nógv er at gera á virkinum.